KÍF-Kyndil 22-29 (10-16):

# Kyndil koyrir á

*Í mun til fleiri av hinum liðunum, so hevur Kyndil ongar trupulleikar við motivatiónini, og leygardagin vunnu teir fjórða sigurin í endaspælinum*



**Kyndil staðfesti aftur framgongdina hjá liðnum leygardagin, tá teir vunnu tryggan sigur á útivølli móti KÍF**

HONDBÓLTUR – MENN
*Jákup Mørk*

Eftir eina mest sum katastrofala fyrru hálvu, hevur nýggja liðið hjá Kyndli veruliga sýnt seg frá sínari bestu síðu í endaspælinum. Avrikini eru støðugt vorðin betri, og á stigatalvuni hevur hetta viðført, at liðið hevur førkað seg frá aftasta upp á fjórða pláss.

### Eingin ivi

Leygardagin í Vestmanna var ongan tíð nakar ivi um, hvat betra liðið var. Frá dystarbyrjan var tað Kyndil, sum setti kósina, og alla tíðina hildu teir seg nøkur mál frammanfyri.

Sum skilst, so vóru tað serstakliga Høgni Klein og Janus Einar Sørensen, sum vodlaðu mótstøðumonnunum høvuðbrýggj, og serstakliga hjá Høgna mundi hetta kennast sum eitt slag av uppreisn eftir laka avrikið móti VÍF hóskvøldið í seinastu viku

Í seinna hálvleiki helt gongdin fram. Kollfirðingar royndu snildur av ymsum slag, men tað vóru mest sum bert teir báðir útlendsku leikararnir, sum veruliga vóru nøkur hóttan, og hetta var sjálvsagt langt ífrá nóg mikið. Kyndil hevði nú fullkomuliga tamarhald á, og tó at liðið telur hópin av ungum leikarum, so fullu hesir ongan tíð í grøvina at taka ov lætt upp á uppgávuna, soleiðis sum talan ofta verður um, tá dystargongdin er, sum hon var.

### Merkisvert

Sigurin tók Kyndil enn eitt fet uppeftir á stigatalvuni, og uttan at taka nakað frá nøkrum, so kann ikki sigast annað enn, at gongdin í seinnu hálvu hevur veirð merkisverd hjá liðnum. Kanska er tað tann sannroynd, at eftir grundspælið vóru allar vónir til liðið burtur, og tískil hava leikararnir kunna spælt uttan trýst av nøkrum slag seinastu dystirnar. Tað er tó undir øllum umstøðum merkisvert, at leikararnir alla tíðina hava hildið fast um motivatiónina at spæla, tí møguleikin fyri heiðursmerkjum er mest sum eingin, og heldur ikki er nakar vandi fyri niðurflyting.

Hetta seinasta má bara sigast at vera gott fyri kollfirðingar, sum nú eru fullkomuliga isoleraðir í botninum. Saman við hoyvíkingum hava teir verið vónbrotið í endaspælinum, og mest av øllum munnu teir nú síggja fram til summarsteðgin, sum loksins kann geva teimum ein steðg frá hondbóltinum, tí í løtuni tykist spæligleðin á liðnum at vera púrasta eingin.

### Dysturin í tølum

**KÍF-Kyndil 22-29 (10-16)**

Málskjúttar:
KÍF: Iljan Topic 6, Durica Tomic 5(1), Jákup Dam 4, Petur Martin Poulsen 3, Regin Petersen 2, Kristian Madsem 1, Vagnur Johannesen 1
Kyndil: Høgni Klein 10(1), Bárður Johannesen 9(2), Janus Einar Sørensen 7, Ken Zachariasen 1, Regin Johannesen 1, Hans Andreasen Dahl 1
Brotskøst: KÍF 1, Kyndil 5
Útvísingar: KÍF 3, Kyndil 4
Dómarar úr Stjørnuni: Carsten Andreasen & Geir Wardum.

Neistin-H71 36-27 (14-10):

# Sveittin kom neyvan fram



*Hóast hoyvíkingar hava nakrar av málsóknastu leikarunum í landinum, so restar enn nógv í, áðrenn liðið kann gera seg galdandi í oddinum*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

**Heini Joensen setti skoringsmet í 1. deild, tá Neistin sunnudagin vann ein lættan stórsigur á H71, sum fullkomuliga er givið at spæla í endaspælinum**

HONDBÓLTUR – MENN
*Jákup Mørk*

Undan kappingini varð roknað við, at skuldi nakar fara at blanda seg í oddadystin millum VÍF og Neistan, so skuldu tað verða hoyvíkingar. Teir megnaðu kanska ikki at blanda seg í oddin, men um ikki annað, so vóru teir á triðja plássinum tá farið varð undir endaspælið, men so er eisini alt sagt.

Í endaspælinum hevur liði snøgt sagt ikki víst nakað sum helst av tí, sum gjørdi teir til medaljukandidatar. At hetta skuldi verða øðrvísi móti Neistanum, mundi fáur trúgva, og tað var so avgjørt heldur ikki.

### Lættur sigur

Neistin vann nevnliga ein sera lættan sigur á hoyvíkingunum sunnudagin. Tað kann væl vera, at máltalvan største partin av fyrra hálvleiki segði, at munurin millum liðini ikki var so stórur, men tað er ikki alt, sum kann gerast upp í málum. Heldur ikki hóast tað eru hesi, sum telja.

Tað var nevnliga alla tíðina soleiðis, at áskoðarin hevði ta fatan, at Neistin kundi mest sum skora eftir vild í dystinum, og at líka mikið, hvussu hoyvíkingar gjørdu móti ikki serliga sannførandi Neista-verjuni, so fóru málini í hinum endanum kortini at gerast fleiri. Harafturat hevði Petur Magnusson hug at taka nakað fleiri skot, enn hoyvíkingarnir bríggjaðu seg um, og so líðandi tók munurin eisini at vaksa á máltalvuni.

Fýra mál vóru soleiðis á muni, tá liðini komu út til seinna hálvleik, og skjótt stóð greitt, at her vendist ikki hjá hoyvíkingum. Neistin togaði seg beinan vegin eini átta-tíggju mál framum, og so var spurningurin bert, hvussu langt upp teir skuldu.

Talan gjørdist ikki um meira enn níggju mál, men fyrst og fremst komst hetta av væntandi nærlagni hjá Neistanum. Óteljandi ferðir tveittu teir bóltin burtur ella vóru ikki nóg hugsavnaðir, tá skot skuldi latast av, og tó at sigurin ongan tíð kom í vanda, so eiga hoyvíkingar at vera takksamir um, at at eyðmýkingin ikki gjørdist størri enn tað sama.

### Viljin restar

Samanumtikið kann ikki sigast annað enn, at dysturin staðfesti munin, sum er á liðunum báðum í løtuni.

Sum nevnt, so varð H71 undan kappingini mett sum besta boðið, um nakað lið skuldi fara at blanda seg í kappingina við Neistan og VÍF, men enn er í øllum førum langt eftir á mál, um hetta skal gerast veruleiki. Tað kann væl vera, at liðið hevur nakrar av frægastu leikarunum í landinum, og við at hyggja at máltindunum sæst í øllum førum, at nakrir av málsóknastu leikarunum í landinum spæla við H71. Men so er eisini tað mesta sagt.

Meira enn nakað annað, so tørvar liðnum ein vilja at spæla og vinna. Tað er nakað, sum ikki ber til at fáa uttan víðari. Her er alneyðugt, at hvør einstakur leikari tekur í egnan barm og endurskoðar, hvat hvør kann gera fyri liðið, og áður enn hetta er gjørt, fer H71 neyvan at ota seg longur upp eftir stigatalvuni.

Hjá Neistanum var sigurin bert ein í røðini, sum mest av øllum man tykjast nyttuleys, nú tað mest sum er greitt, at VÍF verður meistari. Sjálvandi eiga leikararnir at hava vónina og trúnna um, at tað ber til, men, men.

Um ikki annað, so fingu teir sett eitt merki í dystinum, og tað var, at Heini Joensen skeyt heili 16 mál í dystinum. Um talan er um met, skal ikki staðfestast her, men í øllum førum hevur eingin einstakur skotið so nógv mál í einum og sama dysti, síðani táverandi neistaleikarin, Áki Olsen, gjørdi tað móti Tjaldrinum fyri tveimum árum síðani.

### Dysturin í tølum

**Neistin-H71 36-27 (14-10):**

Málskjúttar:
Neistin: Heini Joensen 16(3), Hans Áki Dal-Christiansen 6, John Petersen 4, Áki Mørk 4, Ári Rouch 2, Ræni Slættanes 2, Kári Mortensen 1, Jacob Jónsson 1
H71: Bjarni Wardum 9(3), Halgir Dahl Olesen 7, Finnur Hansson 6, Jákup á Borg 2, Kristjan Petursson 1, Hans J. Jacobsen 1, Olaf Vestergaard 1
Brotskøst: Neistin 3, H71 3
Útvísingar: Neistin 4, H71 7
Dómarar úr Kyndli: Uni Wardum & Hannis Wardum. Hildu eina greiða linju størsta partin av tíðini.



Stjørnan-Kyndil 20-20 (9-8):

# Kyndil skelkaði Klaksvíkina

**Fullkomuliga óvæntað megnaði illa sperdu kyndilskvinnurnar at fáa javnleik burturúr, tá tær sunnudagin vitjaðu Stjørnuna í Klaksvík**



*Hóast Fríða Petersen í løtuni stríðist við ein knæskaða, so átti hon sín avgjørda lut í óvæntaða stiginum, sum Kyndil fekk í Klaksvík*

*Mynd: SjH*

HONDBÓLTUR – KVINNUR
*Jákup Mørk*

Tað varð ikki roknað við, at Kyndil fór at geva Stjørnuni stórvegis av mótstøðu, tá liðini bæði hittust í Klaksvík sunnudagin. Stjørnan hevur mest sum alt árið verið á beinari silvurkós, og hóast kumpassið hevur svikið nakað seinastu tíðina, so mundi tað tó vera somikið brúkbart, at tað ikki skuldi bilað, tá Kyndil stóð hinumegin miðlinjuna.

Kyndil hevur nevnliga fram um hini liðini í kvinnudeildini verið stóra vónbrotið í vetur. Gaman í hevði fáur roknað við, at liðið skuldi blanda seg upp í oddastríðið, men leikarahópurin tóktist í øllum førum somikið sterkur á pappírinum, at talan neyvan skuldi gerast um nakran vanda fyri at missa sætið í deildini.

### Viljin var við

Tað er tó júst tað, sum vandi er fyri í løtuni. Fyrst og fremst av teirri orsøk, at liðið í alt ov lítlan mun hevur sýnt nakran vilja at vinna tøttu dystirnar. Fleiri ferðir hevur annars verið heilt nær við, og ein stórsigur á VB fyri jól boðaði eisini frá, hvørji evni liðið veruliga hevur, men so er eisini alt sagt. Aðrar dystir hava leikararnir til tíðir verið líkasælir, og tá tær so eisini hava tapt fyri StÍF og Sóljuni, var liðið á botnsessinum undan dystinum í Klaksvík.

Tað eru tær tó ikki í dag, tí tað eydnaðist nevnliga Kyndli at fáa stig við sær úr Klaksvík, og tað kann ikki metast sum annað enn ein sensatión av teimum heilt stóru. Móti einum Stjørnuliði, sum var nakað skert, við tað at Joan M. Joensen var burturstødd, eins og Adrijana Milodanovic enn ikki er tøk, fann Kyndil stríðsviljan, sum tær hava leitað eftir so leingi, og fekk Stjørnan veruliga ein harðan dyst.

### Mundi gloppið

Fyrra hálvleik var Kyndil eisini við yvirlutan fyri tað mesta. Í verjuni stríddust tær væl, og hóast Fríða Petersen var hálvgum skadd, so megnaði hon væl at standa ímóti, tá skot vórðu latin av móti málinum.

Í álopspartinum gekst eisini so hampuliga væl. Stríðsviljin, sum eyðkendi verjupartin, viðførdi í øllum førum, at leikararnir ikki bara steðgaðu uttan víðari, og eitt nú mundi Marjun Tróndarson spæla sín besta dyst fyri Kyndil higartil.

Í seinna hálvleiki helt javna dystargongdin fram. Hvørgin parturin megnaði at skræða seg leysan, men so tóktist orkan hjá Kyndli at vera uppi. Innan tríggjar minuttir miðskeiðis í hálvleikinum fekk Stjørnan fýra mál á rað, og so tóktist alt at enda sum vant.

Hetta skuldi tó ikki verða dagurin, har Kyndil bara gav upp. Hesi fýra málini hjá Stjørnuni komu mest sum øll eftir bólttap hjá Kyndli og eftirfylgjandi kontra, men brádliga fingu tær aftur skil á. Seinastu 12 minuttirnar megnaðu tær at halda málinum fullkomuliga reint, og í seinasta minuttinum eydnaðist teimum at toga seg upp á javnt. Tað var tó um reppið, at Stjørnan kortini streyk avstað við sigrinum. Tíggju sekund fyri leiklok skeyt Simona tríggja-metra kast á stongina. Stjørnan fekk fatur á returinum og vann sær enn eina seinastu roynd, men hesa ferðina smekkaði litavin til á tvørtræið.

### Risa týdningur

Fyri støðuna á talvuni merkti eina stigið hjá Kyndli, at tær ikki longur eru niðasta liðið á talvuni. Tað er tó framvegis neyðugt hjá teimum við sigri á Sóljuni, um bjargingin skal verða veruleiki, so í so máta var talan ikki um nakað avgerandi stig.

Hinvegin kann sálarligi týdningurin av sigrinum neyvan undirmetast. Alt ov ofta hevur Kyndil í ár mist stig, tí leikararnir ikki hava havt nóg storan vilja at vunnið. Hesa ferð stríddust tær allar sum ein, og at tað hesu ferð gav úrslit, er ivaleyst nakað, sum tær kunnu nýta í fyrireikingunum til komandi dystirnar.

Fyri Stjørnuna var dysturin kanska enn eitt dømi um, at liðið meira ella minni er uppsteðgað í løtuni. Simona spælir við hálvari ferð og skal helst skurðviðgerast eftir kappingina. Adrijana er framvegis ikki tøk, og nú Joan var burturi, gjørdist tað kanska ov nógv.

Eftir at liðið í allan vetur hevur verið á silvurkós, er nú veruligur vandi fyri, at tær standa við ongum, tá árið er liðugt, men enn kunnu tær tó sjálvar gera hetta av. Kravið, um nakað skal spyrjast burturúr, er tó sera einfalt. Fyri bronsuna skulu tær basa VB í Vági, og skal silvurið kortini gerast veruleiki, verður eisini neyðugt við sigri í Havn móti Neistanum. Tað kann røkkast, men so skal Stjørnan finna munandni betri spæl fram, enn tær hava gjørt seinastu dystirnar, og ikki minst skal orkan eisini fáast longur upp. Onnur frágreiðing finst valla til, at tær nú tvær ferðir í slag hava verið fullkomuliga mál-leysar seinastu 10 minuttirnar av einum heimadysti.

### Dysturin í tølum

**Stjørnan-Kyndil 20-20(9-8)**
**Málskjúttar:**

**Stjørnan:** Simona Dziugyte 8(2), Una Olsen 4, Anna Kristina Samson 4, Bára Skaale 2, BEinta Klakstein 1, Jastrid Gullaksen 1
**Kyndil:** Lotte Sørensen 7(3), Marjun Tróndarson 4, Palma Petersen 4, Annika Ljósstein 3, Ann Mari Wang 1, Anja Johansen 1
**Brotskøst:** Stjørnan 2, Kyndil 3
**Útvísingar:** Stjørnan 1, Kyndil 1
**Dómarar úr KÍF:** Jákup Dam & Vagnur Johansen.

# Ikki tveir men tríggir

Í leygardagsblaðnum skrivaðu vit, at tli komandi nevndarvalið hjá Fótbóltssambandinum stóðu tveir nevndarlimir fyri vali, og at hesir vóru Jákup Simonsen og Karl Vidtfeldt.

Hetta var tó ikki heilt rætt. Tríggir nevndarlimir skulu nevnliga veljast í nevndina. Umframt sessirnar hjá teimum báðum, Jákupi og Karl, er talan um nevndarsessin hjá Dánjali Andreasen. Hesir verður sum kunnugt formaður eftir komandi aðalfundin, og tískil er her talan um ein leysan sess hjá valevnunum at stríðast um.

Vit biðja lesararnar halda okkum til góðar hesum viðvíkjandi.

***-jm***

Sosialurin
Lesið Sosialin – tað loysir seg